DAGSINS MEINING

Eitt heiðurligt úrslit

Hugaligt var tað at síggja okkara fótbóltslandslið royna seg aftur á leikvølli, hesaferð í Jugoslavia. Gott í tykkum í SVF, at tit gjørdu tað møguligt hjá Føroya fólki at síggja dystin, sum enn einaferð vísti, at vit eiga eitt landslið, sum stendur seg millum teir stóru.

Vit taptu, men at tapa 2-0 móti einum av heimsins bestu liðum og við professionellum spælarum er eitt framúr gott úrslit. Jugoslavia er á einum 12. plássi í heiminum, meðan Føroyar liggja á einum 117. plássi, sambart hagtølunum, sigst.

Tað er greitt, at vit sakna spælarar sum Toda í álopinum, men vónandi verður tað ikki long tíð aftrat, at hann er við aftur á landsliðnum. Hinvegin er landsliðið vorðið so mikið væl samanspælt, at tað megnar at steðga slíkari fótbóltsmaskinu sum eitt nú tí jugoslaviska landsliðnum. Vildi væl við hjá okkara landsliði í dystinum mikukvøldið kundi úrslitið lættliga verið ein munur uppá einans eitt mál.

Tað eru nú nøkur ár síðani, at Føroyar fóru at luttaka í altjóða fótbólti. Síðani tá hava verið røddir frammi um, at vit áttu heldur at brúkt orkuna til okkara heimliga fótbólt og til ungdómsarbeiði. Vit høvdu einki at gera millum teir stóru.

Tíðin hevur prógvað, at tað var røtt avgerð at royna seg í altjóða kappingum sum sjálvstøðug fótbóltstjóð. Hetta hevur givið okkum drúgvar royndir. Hetta hevur skapt íblástur og hevur stimbrað heimliga fótbóltin. Spurningurin er so um tað er nóg mikið! Tað hevði einki gjørt, at vit nú fingu eitt alment orðaskifti um luttøku okkara í altjóða fótbólti, hvat er komið burturúr, hvat kundi verið gjørt betri og hvussu vit seta út í kortið av nýggjum! Rætt og slætt – at vit evalueraðu hetta fyrsta 10 ára skeiðið.

At føroyskir leikarar verða tendraðir av at luttaka í altjóða kappingum í dysti við teir stóru og kendu er ein sannroynd. Hetta kann skapa gróðrarbotn fyri meira miðvísari venjing og íblástri hjá tí einstaka at koma víðari. Góð dømi eru um hetta nú fleiri av okkara spælarum verða seldir av landinum. Tað er eingin loyna, at flogvitið í føroyskum fótbólti Todi Jonsson eigur eitt stórt pláss í mongum føroyskum fótbóltshjartað og verða stórar vónir settar til framtíð hansara í altjóða fótbólti. Tí er tað okkara alra vón, at hann verður við í seinna dystinum millum FCK og Lazio, soleiðis at hann sleppur at prógva sítt fótbóltskynstur á vølli saman við fleiri av heimsins bestu. Hóast tað er rætt at satsa uppá teir »gomlu« evnaríku spælararnar er eisini rætt at lata upp fyri yngri kreftum.

Vit síggja fram til komandi dystirnar á Svangaskaði og Tórsvølli móti Luxemburg og Ruslandi. Tøkk til SvF fyri góðan dekning, og ikki minst til beinraknu og áhugaverdu viðmerkingarnar frá Jóannesi Jakobsen. Tær eru við til at krydra slíkan dyst, lyfta hann upp á eitt hægri støði og geva eisini teimum, sum bókstavliga eru á síðulinjuni innlit í hetta annars so litfægra og fjølbroytta spæl.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

FøroyaTele rennur ørindi fyri »Hesuferð«

Jóanes N. Dalsgaard

Í seinastu viku kom fram, at fyrrverandi fiskivinnustjórin í landsstýrinum, Kjartan Hoydal, stendur aftan fyri eina herferð, sum hevur til endamáls at undirgrava trúðvirðið løgmans. Ráðagerðin varð avdúkað, tí Kjartan Hoydal hevði sent eitt samskipanarskriv ráðagerðini viðvíkjandi til aðrar móttakarar, enn hann í veruleikanum hevði ætlað. Málið varð viðgjørt í fjølmiðlunum, ikki minst vegna tess, at løgmaður loyvdi sær at siga sína hugsan um hetta undirgravingarvirksemið. Síðani hevur Kjartan Hoydal úttalað, at hann heldur tað verða óetiskt av løgmanni at fyrihalda seg til loynidómar, sum ikki eru ætlaðir at koma honum fyri oyra.

Hvørt tað er meira óetiskt at hava eina meining um tað, at vera stungin í ryggin enn tað er óetiskt at vera hann, sum førir knívin, skal eg lata onnur døma um. Men eitt stendur rimmarfast: Tað má hava almennan áhuga fyri føroyingar at vita, hvussu stevið er í landsstýrinum. Tá tað kemur fram, óvart ella ikki, at sterkar kreftir á politiska leikpallinum eru farnar undir eina samskipaða herferð, fyri at fella sína egnu stjórn, so má tað vera rættur føroyinga at vera kunnaðir um hetta. Hetta má og eigur at verða skylda fjølmiðlanna, og fyri einaferð skyld kendu fleiri teirra sína vitjunartíð.

Hvussu løgið tað enn ljóðar, so er júst leiklutur fjølmiðlana fallin heimasíðuni hjá Føroya Tele fyri bróstið. Í háðandi og niðrandi vendingum vera teir fjølmiðlar, sum undraðust á álitisbrotið ímóti løgmanni, skuldsettir fyri at vera lopnir framav. Hinvegin verður SvF, sum, hóast almennur tíðindastovnur, valdi ein serstakliga tendensiøsan vinkul til málið, til tess at undirgrava trúvirðið løgmans enn meira, róst fyri hetta á heimasíðuni www.portal.fo sum FøroyaTele eigur og rekur.

Tað, sum eg undrist á, er hvønn áhuga eitt alment partafelag, sum Føroya-Tele, kann hava í, at útbreiða einvíst partapolitiskar boðskapir, so ella so. Ein skrivligur fyrispurningur til Føroya Tele um hetta er ikki svaraður, og ger hetta ikki undran mína minni. Spurningurin er, nú vit tosa um etik, um tað er etiskt forsvarligt, at brúkaragjøld til Føroya Tele verða nýtt til at fíggja partapolitiska propaganda. Kanska stjórin í Føroya Tele ella landsstýrismaðurin í vinnumálum hava eina meining um tað?

Konfrontatiónslinjan og Fólkaflokkurin

Jógvan á Lakjuni
tingmaður Fólkafloksins

Ferð eftir ferð verður av konfrontatiónslinjuni í Tjóðveldisflokkinum – serliga í Fregnum, men eisini í (samskipaðum?) lesarabrøvum - júkað upp í saman, at Fólkaflokkurin er í tvíningum í sjálvstýrismálinum – og so verður løgmaður svertaður til!

Tú spyrt teg sjálvan, hvat endamálið er við hesum. Er tað veruliga so galið, at hesir menn eru úti eftir at spjaða sjálvstýrisvongin í Føroyum?

Í Fólkaflokkinum stendur øll ting- og landsstýrismanningin saman um løgmann í miðvísa arbeiði hansara at fáa veruligar loysnir á sjálvstýrisleið sambært løgtingssamtyktini um sjálvstýri Føroya fólks.

Tað var ein trupul avgerð, tá ið fólkaatkvøðan varð avlýst, men vit taka fult undir við teimum sjónarmiðum, sum løgmaður legði sum grund fyri síni støðutakan í hesi torføru avgerð.

Samskiftið innanveggja í Fólkaflokkinum er gott og vinarligt. Sjálvandi eru vit ósamd við hvørt – tað hava vit jú loyvi til í einum demokratiskum flokki. Men øll mál verða viðgjørd við virðing fyri sjónarmiðunum hjá hvørjum øðrum, og allar niðurstøður floksins eru gjørdar í semju millum ting- og landsstýrismenn.

Tað er ikki ókendur taktikkur, tá ið áralagið ikki er so gott innanborða hjá einum sjálvum, at venda eygunum frá egnari ómegd og geva øðrum skyldina!

Men her er adressan skeiv! Tingmanning Fólkafloksins stendur saman og stuðlar løgmanni og landsstýrismonnum floksins í teirra dagliga arbeiði í landsstýrinum!

Eg vóni ikki, at tað fer at eydnast konfrontatiónslinjuni at spjaða okkum, sum veruliga vilja hava sjálvstýri í Føroyum.

Latið ikki konfrontatiónirnar oyðileggja loysnirnar!

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tíðindaleiðari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin

Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

VIÐMERKINGAR

Almenn viðmerking um Búskapargrunnin

Karsten Hansen
landsstýrismaður í fíggjarmálum



Leygardagin sigur løgmaður sambært Dimmalætting, at uppskotið til Búskapargrunn er ikki hálvliðugt. Hann fýlist á, at uppskotið varð lagt fram fyri allar tingmenn og fyri almenningin hósdagin 9. august.

Hetta eru úttalililsi frá løgmanni, sum eg ikki vil hava sitandi á mær. Tey ganga beint ímóti greiðum politiskum avtalum.

Tí er neyðugt at sláa fast, hvussu gongdin hevur verið í hesum máli, og hvørjar avtalur eru gjørdar.

Eisini skal beinanvegin verða afturvíst tað, ið stóð í grein í Dimmalætting um, at eg skal hava skotið upp at privatisera fyri stórar upphæddir til Búskapargrunnin. Eg havi ikki mælt til privatiseringar, og tíðindini byggja helst á eina misskiljing frá álitinum, sum búskaparfrøðingar hava skrivað um Búskapargrunnin. Har verður sagt, at um almennar ognir verða privatiseraðar eins og gjørt er í okkara grannalondum, so er talan um upphæddir upp til 5 mia. krónur. Men onki uppskot um privatisering liggur í mínum uppskoti til Búskapargrunn.

Uppskotið hevur fingið tvey ára viðgerð

Onki uppskot hevur í míni tíð fingið so drúgva viðgerð í samgongu og í landsstýri sum Búskapargrunnur Føroya:

1. Búskapargrunnurin varð skotin upp í Hvítubók sum eitt tað týdningarmesta amboðið til ein sjálvberandi, føroyskan búskap. Har varð nágreiniliga lýst, hvussu hesin grunnur kundi virka og gerast eitt varandi amboð til at tryggja ognirnar hjá Føroya fólki – nú og hjá komandi ættarliðum.

2. Stutt eftir at Hvítabók varð almannakunngjørd á heysti í 1999, settu landsstýrismenninir í sjálvstýrismálum og fíggjarmálum í felag ein bólk at gera eitt ítøkiligt álit og eitt uppskot til lóg fyri grunnin. Bólkurin kannaði skipanir kring heimin, og fólk frá bólkinum vóru millum annað á kanningarferð í Noregi, har norska skipanin varð kannað nágreiniliga.

3. Í november í fjør varð álit liðugt, sum landsstýrismaðurin í sjálvstýrismálum kunnaði landsstýrið um.

4. Í februar í ár varð tað ítøkiliga lógaruppskotið lagt fyri landsstýrið og síðani av løgmanni sent øllum samgongulimum til ummælis. Ongin viðmerking varð gjørd.

5. Í uppskotinum til fólkaatkvøðu og í tí seinna uppskotinum til sjálvstýri Føroya fólks er nágreiniliga ásett, hvussu Búskapargrunnurin skal virka.

6. Uppskotið kundi verðið lagt fyri tingið áðrenn seinasta tingseta endaði, men landsstýrismenninir í sjálvstýrismálum og fíggjarmálum mæltu til, at uppskotið fyrst varð lagt fyri alt tingið á kunnandi fundi og at roynt varð at fáa eina semju við andstøðuflokkarnar eisini.

7. Í summar varð lógaruppskotið enn einaferð av løgmanni sent øllum samgongulimum til ummælis – og eingin viðmerking kom frá nøkrum flokki.

8. Á landsstýrisfundi 23. juli 2001 var semja um, at lógaruppskotið skuldi fyri tingið sum skjótast, meðan ein nevnd varð sett at viðgera útgjaldsspurningin, sum skal ásetast í seinni lóg. Hartil var semja um, at uppskotið skuldi leggjast fram fyri alt tingið og almenningin beint eftir ólavsøku. Tað varð gjørt hósdagin 9. august – og sama morgun harmaðist løgmaður um mótvegis mær, at hann ikki fekk stundir at vera við á fundinum.

Sostatt er tað ikki í samsvari við gjørdar avtalur, at løgmaður sambært Dimmalætting tosar um »eitt hálvliðugt uppskot«. Tað er heldur ikki rætt at finnast at tí, at uppskotið varð lagt fram fyri allar tingmenn, tí hetta er sambært greiðari avtalu í landsstýrinum.

Tað er beint ímóti greiðum avtalum og løgtingssamtyktini um sjálvstýri Føroya fólks, at løgmaður nú krevur útgjaldspartin við í uppskotið. Eitt krav, ið ger tað trupult at finna breiða semju um Búskapargrunnin.

Eg eri harmur av úttalilsum løgmans í hesum máli, sum so nógv orka er løgd í at fyrireika og fremja. Mær vitandi hevur onki mál í hesum valskeiði fingið neyvari viðgerð.

Eg eri keddur av, at løgmaður ógrundað átalar meg gjøgnum fjølmiðlarnar – uttan at siga mær frá, hví hann dregur í land sambært gjørdar avtalur.

Møguleikar skuldu annars í løtuni verið, sum løgmaður eisini tosar um, at fingið breiðar semjur í Løgtinginum.

Tað er ørkymlandi, at løgmaður átalar meg fyri at gera sambært avtalum. Hann átalar ikki alment landsstýrismenn í sínum egna flokki, sum ferð eftir ferð hava brotið allar vanligar siðvenjur í politiskum arbeiði.

Síðan samgongan varð skipað hevur málgagn fólkafloksins, við formanni floksins sum blaðstjórða, viðgjørt meg og mín flokk á tingi á ein sera negativan hátt.

Eg haldi meg vita, at løgmaður er ósamdur í hesi skriving, ið bert tykist forða fyri at setningur samgongurnar verður framdur, tó hevur hann ongantíð alment átalað henni.

Áheitan mín skal vera, lat okkum rudda hesar misskiljingar av vegnum og halda fram við tí, eftir mínari meting, sera góða samstarvi, ið hevur verið okkara millum í hesum skeiði.

Argir, 14. august 2001

Norðurlendsk orðabókaráðstevna

Frá mikudegnum 22. august til leygardagin 25. august verður Ráðstevna um orðabókafrøði í Norðurlondum hildin í Norðurlandahúsinum í Havn. Hetta er afturvendandi ráðstevna, sum hildin verður annaðhvørt ár. Ráðstevnan hesa ferð er hin sætta í røðini, og hetta er fyrstu ferð, hon verður hildin í Føroyum.

Tað er Føroyamálsdeildin á Fróðskaparsetrinum saman við Norðurlendskum felag fyri orðabókagerð (NFL) og Málráð Norðurlanda, ið skipar fyri ráðstevnuni. Norðurlendska orðabókafelagið varð stovnað í mai 1991 og hevur limir í øllum Norðurlondum, til samans um leið 300 orðabókafrøðingar. Endamál felagsins er at fremja skipað samskifti og samstarv í Norðurlondum á orðabókafrøðiliga yrkisøkinum og at tryggja samanhald ímillum starvsfelagar tvørtur um landamørk, eitt nú við at skipa fyri ráðstevnum og at geva út orðabókafrøðitíðarritið Lexico-Nordica, sum higartil er komið í 7 numrum.

At ráðstevnan í ár verður hildin í Føroyum er frágerða gott høvi at savna royndar og viðurkendar orðabókafrøðingar og málfrøðingar til ráðstevnu, sum uttan iva fer at gagna bæði norðurlendskum og føroyskum orðabókafrøðiligum arbeiði, so at vit gerast enn betur før fyri at nøkta tann tørv á orðabókum, sum alla tíðina er í samfelagnum.

Til ráðstevnuna koma fólk úr øllum Norðurlondum og einstøk úr øðrum londum eisini. Við føroyskum luttakarum verður roknað við til samans 130 fólkum. Ráðstevnan verður sett mikumorgunin 22. august og heldur so á til seinnapartin leygardagin 25. august. Hvønn dag verður lagt fyri við einum fyrilestri í plenum, sum verður mettur at hava breiðan áhuga hjá ráðstevnugestunum, og síðan verða tveir og tveir fyrilestrar hildnir samstundis til út á seinnapartin. Í evni fevna fyrilestrarnir um bæði ástøðiliga og verkliga orðabókafrøði í Norðurlondum. Støði verður ymist tikið í orðabókaverkum, sum eru útkomin, og ymist í verkætlanum, sum eru ávegis. Eyðvitað spyrst mangt týdningarmikið burturúr, sum fer at bera føroyska og norðurlendska orðabókagransking longri fram á leið. Á ráðstevnuni verður eisini høvi at sýna fram orðabøkur og aðrar orðabókafrøðiligar bókmentir og eisini framsýning av praktiskum orðabókaarbeiði. Til tess at styrkja samanhald og persónlig sambond verður skipað fyri útferðum og øðrum, so at gestirnir eisini fáa eina hóming av Føroyum og føroyingum – mentan og gerandislívi.

Ein tílík ráðstevna má avgjørt metast at hava stóran fakligan týdning fyri allar teir føroyingar, sum fáast við orðabókaarbeiði, so at teir kunnu kunna seg við tað, sum rørist í líkum umhvørvum í grannalondunum, og ráðstevnan er eyðvitað gott høvi at siga frá og kunna um egin orðabókaarbeiði.

Eftir at ráðstevnan er hildin, verða allir fyrilestrarnir givnir út í bók í røðini Skrifter udgivet af Nordisk forening for leksikografi, har ið bøkur frá undanfarnum ráðstevnum eru útgivnar.

Luttøkugjaldið er kr. 900,00 og fyri limir í NFL kr. 750,00.

Skuldi onkur enn havt áhuga at teknað seg til ráðstevnuna, kann tað gerast við at venda sær til Føroyamálsdeildina á tlf. 31 53 04.

Rock-konsert í Havn leygarkvøldið

Grót á rull kring Føroyar

Tónleikasamtakið Grót økir støðugt um virksemið, og skipar nú m.a. fyri konsertum ymsastaðni í landinum. Hin fyrsta verður nú leygarkvøldið kl. 21.30 í Gamla Meiarínum, hølunum hjá Grímu, í Havn. Tá fara tveir bólkar á pallin, Krit og Marigold.

Hesir bólkar eru báðir kendir fyri at spæla sín egna og sermerkta tónleik. Krit gjørdu vart við seg í prix fo undanumfarinum í Klaksvík, tá mong mettu at teir avgjørt áttu at komi víðari í finaluna. Krit spæla sera harðan rocktónleik, við íblástri frá m.a. Marilyn Manson, Deaftones, Korn o.m.ø.

Marigold spældu á prix-undanumfarinum á strondum. Marigold vóru, eins og Krit, við til tað fyrstu Free Føroyar konsertina í læraraskúlahøllini. Tey skuldu spæla á Jazz Festivalini saman við Clickhaze, men noyddust vegna ferðsluóhapp at geva avboð. Men nú eru Marigold aftur til reiðar saman við Krit at taka Havnina við storm! Marigold spæla eitt slag av hørðum poppi/rokki við vøkru røddini hjá Janu Jalgrimsdóttir á odda. Løgini eru vøkur men larmandi, og kunnu sammetast nakað við bólkar sum eitt nú Glorybox og Skunk Anansie.

Ætlanin hjá Grót er at hava fleiri konsertir kring Føroyar við bólkum, ið spæla egið tilfar. Hin fyrsta verður sum sagt í Havn nú um vikuskiftið, og hin onnur í Klaksvík fríggjakvøldið 24. august, tá m.a. Clickhaze fara á Pallin.

Grót minna eisini á aðalfundin, sum verður mánadagin 20. august í losjuni í Gøtu.